# Tromsø í finaluni

Føroysku útisetarnir í Noreg vunnu leygardagin dyst í hálvfinaluni í norsku steypakappingini.

Í hálvfinaluni spældi Tromsø á heimavølli móti Kristianssund, sum í fjør vann steypakappingina. Tað gera teir tó ikki í ár, tí eftir einum góðum og spennandi dysti eydnaðist Tromsø at vinna dystin 3-1. Settúrslitini vóru 22-25, 25-22, 25-22, 25-22.

Á heimasíðuni hjá Tromsø verður serstakliga venjarin hjá felagnum, sum jú eisini er føroyskur landsliðsvenjari, róstur fyri góðu fyrireikingina.

Somuleiðis er Rúni Weihe millum spælararnir, sum fáa rósur frá heimasíðuni.

Í finaluni skal Tromsø spæla ímóti Nyborg úr Bergen. Finaludysturin verður spældur 7. januar, og veðrur hesin vístur beinleiðis á NRK1.

-mørk

TB-ÍF 2-3
(25-23, 26-24, 22-25, 23-25, 13-25):

# Trý ÍF-sett á rað

TB megnaði ikki at halda fast, og hóast 2-0 leiðslu, taptu tær dystin móti ÍF við trimum settum móti tveimum.

TB tóktist annars at hava takið á dystinum, tí hóast ÍF á ongan hátt legði seg niður, so megnaði heimaliðið at taka tey bæði fyrstu settini.

Men tær megnaðu ikki at halda fast. ÍF kom aftur í dystin, og við mest sum berum treiskni megnaðu tær alla tíðina at halda fast um dystin. Við bara einum setti, har munurin var fleiri enn tveir bóltar, staðfesti úrslitið eisini javna stríðið, sum alla tíðina helt sær. Men stigini fóru tó norður aftur um fjørðin, soleiðis at tær úr Fuglafirði staðfestu, at tær ætla sær heiðursmerki í ár.

-mørk

# Teknikapping í Sosialinum



Teknikappingin í Sosialinum er byrjað. Kapping er skipað soleiðis at hvønn dag til jóla, verður ein mynd av Jólamanninum Kjøtkróki í Sosialinum. Børnini skulu gera eina tekning, sum líkist so nógv sum gjørligt. Niðast á síðini er ein lepi, sum tit skulu klipsa saman við tekningini. Minnist til at tað skal verða ein lepi fyri hvørja tekning.

Tekninganir skulu verða okkum í hendi 27 desember. Tí tá kemur Kjøtkrókur oman í Miðlahúsið at finna vinnarin. Vinningurin er eitt gávukort á 1000 kr. frá einari av hesum fyritøkum:

**Hjá Gunleivi · Føroya Banki · Statoil BR-Leikur Føroya Lívstrygging · Føroya Bjór SMS · Tryggingarfelagið Føroyar · Kall Balslev · Føroya Tele · Skemman · MBM Daddan · FK · Rio Bravo · Nantong · Pizza 67 Farodane City · Vøruhúsið á Hjalla · Føroya Sparikassi · Atlantic Airways · Bowling Merlot · TelduTænastan · A.H.Jensen · Hjá Eli Smúkkuhjørnið · Postverk Føroya · Glas & List Atlanticpane**

Navn:____________________

Adressa:____________________

**Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn.
Merkið brævbjálvan "Teknikapping"**




Hugnaligt vikuskifti í Bergen ella skíðvikuskifti í Voss – valið er tykkara

Sigið gerandisdegnum farvæl og njótið eitt avslappandi vikuskifti í Bergen. Tit búgva á hugnaligum gistingarhúsi mitt í býnum – Bergen er beint uttanfyri dyrnar.

Spákið í gamla býarpartinum og njótið ógloymandi útsýnið yvir Bergenfjørðin. Vitjið hugnaligu matstovurnar og roynið vælsmakkandi hjørtabúffar og spennandi reinsdjóraættir. Keypið klæðir ella fløgur og síggið, at prísirnir eru teir somu sum í Danmark.

Tit kunnu eisini koyra til Voss – 2 tímar frá Bergen – og standa á skíð.

Prísur fyri hvønn úr kr. 1.295,-

Íroknað prísin er: Ferðin fram og aftur við bili í 2 koyggjukamari við wc/bað. Hartil 2 nætur í dupultkamari á Thon Hotel Orion Bryggen í Bergen. Morgunmatur íroknaður. Oljuavgjald og avgreiðslugjald ikki íroknað.

VOSS liggur einans 2 tímar í bili frá Bergen. Har eru skíðbreytir fyri bæði børn og vaksin. Kavagaranti, góðar liftir, hugnaligar matstovur og aktivitetir fyri stór og smá. Serlig tilboð til børn eru eisini á staðnum.

Áhugaverdar heimasíður:
www.visitbergen.com
www.visitvoss.com

J. BRONCKS GØTA 37
P.O. BOX 370
FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00
FAX 34 59 50
BOOKING@SMYRIL-LINE.FO
WWW.SMYRIL-LINE.COM